# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Eg tordi illa at fara á sjúkrahúsið at biðja tey hjálpa mær, tí tey høvdu heilt vist noktað at taka gipsið av*

*Allan Mørkøre*

# Útvarpa neyvan úr Litava

**Endaliga avgerðin var ikki tikin við evstamark okkara. Men fyri fyrstu ferð í 18 ár er líkt til, at Útvarpið hjá Kringvarpinum ikki sendir beinleiðis, tá Føroyar spæla undankappingardyst**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Síðani føroyska Útvarpið sá dagsins ljós í 1957, hava frásagnir frá fótbólti og ikki minst fótbóltslandsdystum verið fastur partur av innihaldinum.

Fyrstu mongu árini vóru landsdystirnir ikki so regluligir, men síðani fyrstu fetini vórðu tikin á altjóða pallinum, hevur útvarpsmanningin verið fastur partur av ferðalagnum, tá vitjað hevur verið á leikvøllum kring alt Europa.

Men eftir øllum at døma verður Kringvarpið ikki við, tá føroyska A-landsliðið tann 15. oktober spælir seinasta undankappingardystin í ár. Ein dystur, sum samstundis markerar endan av skeiðnum hjá Jógvan Martini Olsen sum føroyskum landsliðsvenjara.

Tá vit í morgun tosaðu við Anniku Mittún Jacobsen, kringvarpsstjóra, segði hon, at endaliga avgerðin ikki var tikin, men at avgerðin verður tikin í dag.

- Men vit koma at senda dystin í sjónvarpinum, og har kunnu vit so hava prát við fólk bæði undan og eftir dystin, eins og vit koma at kommentera dystin úr sjónvarpsstudionum. Men vit umhugsa so, um tað eisini er neyðugt at útvarpa dystin.

- Hetta er eitt kringvarp, og senda vit hendan dystin í Sjónvarpinum, so kann Útvarpið senda aðrar dystir, sum vit ikki hava møguleika at taka niður umvegis fylgisvein. Tí spurningurin er eisini, um vit alla tíðina skulu senda dystir í báðum støðunum á einum stovni, sum alla tíðina skal velja, hvat vit skulu fara eftir.

*Men Útvarpið er við tíðini vorðið mest sum synonymt við fótbóltslandsliðið. Skilir tú tey, sum kanska reagera eitt sindur kraftiga, um hetta verður avgerðin?*

- Eg skilji tað væl. Men hinvegin skilji eg eisini hugburðin hjá teimum, sum halda tað vera løgið, at tú eisini skalt hoyra ein dyst í Útvarpinum, sum tú sært í Sjónvarpinum.

*So tað er av fíggjarligum ávum, at tað møguliga verður skorið niður í hesum?*

- Tað er so tað, sum vit sita og viðgera nú. Spurningurin er, um vit á einum stovni skulu brúka fleiri miðlar til at dekka tað sama, sigur Annika Mittún Jacobsen, kringvarpsstjóri.





*Útvarpsmanningin hevur altíð verið fastur partur av landsliðsferðalagnum. Men í løtuni er sannlíkt, at hetta ikki verður so, tá spælt verður í Litava um tvær vikur*

## Broyttu avgerðina

Beint áðrenn blaðið fór til prentingar, frættu vit úr Kringvarpinum, at ljóð kortini verður sent úr Litava tann 15. oktober. Sum skilst verður loysnin, at ein tøkningur og ein frásøgumaður fara við í landsliðsferðalagnum, og at hesir koma at standa fyri framleiðslu av bæði ljóði og myndum.
Tá landsliðið spældi í Beograd í seinasta mánaði hevði Kringvarpið til samans seks mans á staðnum.

**-mørk**

## Taka hópin út í dag

Tað verður ikki fyrr enn í evstu løtu, at Karel Brückner, landsliðsvenjari hjá Eysturríki, tekur út hópin, sum skal til Føroya at dystast.

Tað er tó einki at ivast í, at tey í Eysturríki síggja dystin sum ein møguleika at lyfta landið upp í toppin í okkara undankappingarbólki, eftir at Eysturríki higar til hevur vunnið stær trý stig í tveimum dystum.

Eysturríkska landsliðið hevur ongan tíð áður spælt í Føroyum, men tað hevur Karel Brückner tó verið. Hann var nevnliga landsliðsvenjari, tá Kekkia í 1997 vann 1-0 móti Føroyum á Svangaskarði. Málið ta ferðina var hitt tiltikna, tá føroyingar bíðaðu eftir at fáa bóltin aftur frá Patrick Berger, men heldur enn at virða Fair-Play regluna, byrjaði hesin ístaðin álop, sum endaði við, at Vladimir Smicer kundi skjóta einsamalla málið í dystinum. Og so kann leggjast afturat, at hetta var tað nærmasta, sum Kekkia kom einum stigamissi hesa undankappingina, har teir vunnu bólkin við fullum stigatali. Hetta gjørdi veruleiki, tá teir í seinasta dystinum vunnu 2-0 móti Føroyum, og heldur ikki ta ferðina hendi tað uttan rok. Partvíst tí ein framúr væl upplagdur Todi Jónsson støðugt bjóðaði allari kekkisku verjuni av, og partvíst tí tvídystur millum Pól Thorsteinsson og Patrick Berger endaði við, at báðir spælararnir fingu reytt kort.

**-mørk**

# Taptu eisini seinasta dystin

**U19-kvinnulandsliðið spældi í gjárkvøldið sín seinasta dyst í hesum EM-undanspælinum. Tær taptu dystin ímóti Rumenia 1-4**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Tað eydnaðist ikki føroysku U19-kvinnunum at fáa nakað stig við heimaftur til Føroya, nú tær hava verið og leikt EM-undankapping í Portugal.

Eftir tap fyri Noregi og Portugal, leiktu tær í gjár ímóti Rumenia. Rumenia legði seg á odda í fyrra hálvleiki, men tað eydnaðist Føroyum at javna til hálvleiksstøðuna 1-1 við einum rumenskum sjálvmáli.

Í seinna hálvleiki legði Rumenia seg á odda 2-1, og eftir at Føroyar mundu javna til 2-2 við frálíkum skoti á tvørtræið, fór luftin úr føroysku ballónini. Rumenia fekk tvey mál afturat, og vann dystin 4-1.

Heili trý av málunum hjá Rumenia komu eftir hornaspark.

**Úrslitini á túrinum gjørdist sostatt hesi:**
Føroyar - Noreg 0-8
Føroyar - Portugal 0-1
Føroyar - Rumenia 1-4

Føroyska ferðalagið verður aftur í Føroyum í kvøld, hóskvøldið.



*Tað eydnaðist ikki føroysku U19-kvinnunum at fáa stig við sær, tá tær í vikuni vóru partur av EM-eundankapping í Portugal*